# Kunngerðablaðið A

2022 Givið út 14. januar 2022


Nr. 4 12. januar 2022

**Kunngerð um broyting í kunngerð um veterinert eftirlit við innflutningi av matvørum úr djórum**
(Stóra Bretland verður tikið upp á listan yvir lond, hvørs vøra er undantikin veterinerum eftirliti eftir § 1, stk. 3)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 24 frá 16. mars 2001 um veterinert eftirlit við innflutningi av matvørum úr djórum, sum broytt við kunngerð nr. 128 frá 21. september 2001, kunngerð nr. 11. frá 8. mars 2006, kunngerð nr. 119 frá 14. september 2011 og kunngerð nr. 202 frá 22. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 3.* Vøra, sum verður innflutt úr londum, nevnd í fylgiskjali 19, er undantikin tí veterinera eftirliti, sum annars er galdandi eftir stk. 2. Vøran skal koma frá ES-góðkendum virkjum ella frá virkjum, ið eru góðkend av íslendskum myndugleikum. Fráboðan um vøruna skal latast Heilsufrøðiligu starvsstovuni á fylgiskjali 20. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann gera stak-eftirlit av vøruni, t.d. um illgruni er um vanda fyri fólkaheilsu ella djóraheilsu.”

**2.** Í fylgiskjali fylgiskjali 19 verður undir “New Zealand” sett: “Stóra Bretland”.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 12. januar 2022

**Magnus Rasmussen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)